## Sett merktar kalvar út

Magnus Heinason hevur sett út nakrar merktar alikalvar á Landgrunninum. Kalvarnir vórðu klaktir hjá Fiskaaling í Nesvík í 2005 og eru uppvaksnir har. Kalvarnir eru settir út vestur úr Mýlingi, vestur úr Mykinesi og út fyri Toftum í Eysturoy, ávikavist 71, 70 og 60 kalvar í hvørjum stað. Nú teir vórðu sleptir út, vóru teir millum 48 og 75 cm til longdar og vigaðu millum 1000 til 5300 gram. Havstovan sigur, at kalvarnir eru lættir at kenna frá vanligum kalvum, tí liturin hvítumegin er nógv blandaður við litin á eygnasíðuni. Fjaðrarnar eru eisini nakað slitnar, serliga uggafjaðrarnar og á teimum flestu eisini sterturin. Harafturat eru teir merktir. Havstovan sigur, at fólk sum veiða ein slíkan kalva, verða biðin um at senda hann til Havstovuna, Nóatún 1, Tórshavn, helst so heilan sum gjørligt. Tað meinast óviðgjørdan, hetta fyri at kanningin av fiskinum verður betri. Harafturat vil Havstovan hava upplýsingar um veiðistað, veiðitíð, veiðireiðskap og annað. Havstovan letur 125 krónur + virðið á fiskinum fyri ein innsendan kalva. Verður bert merkið latið inn, er finningarlønin 50 kr. Har umframt luttekur innsendarin í árliga lutakastinum um 12500,- kr fyri innsend merkir, skrivar Havstovan á heimasíðu síni.

## Skálaberg heim við fullari last

Flakatrolarin Skálaberg fór í gjárkvøldið at sigla heim eystaneftir við fullari last. Skálaberg hevur havt góðan fiskiskap í seinastuni. Teir fóru úr Føroyum 2. juli og hava fingið fulla last - 1.160 tons av flaki. Hanus Hansen, reiðari, sigur við Norðlýsið, at veiðsan verður løgd upp í Norðhavnini í Ánunum, og Skálaberg fer aftur til fiskiskap beinanvegin, sigur hann.

# 100 í hølunum á Óla

**Túrurin »Í slóðum føroyinga í Íslandi« fekk nógv betri undirtøku, enn roknað varð við, og tey 25 væntaðu gjørdust til fleiri enn 90.**

ÍSLANDSFERÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin*

- Vit høvdu vónað, at vit kláraðu at fylla ein buss. Vit vóru jú eisini nakað sein úti við hesum túrinum, men undirtøkan hevur næstan tikið okkum á bóli, sigur Annika Larsen Black, søluleiðari hjá Smyril Line á heimamarknaðinum.

Nú vórðu tey í staðin noydd at taka tveir bussar við, sum báðir verða fullfermdir.

- Tað eru ikki meiri enn 14 dagar síðani, at túrurin fekst í lag. Vit hugsaðu um, at vit áttu at gjørt meiri við Íslandssiglingina, og so kom hugskotið at seta okkum í samband við Óla Jacobsen at vita, um hann hevði havt áhuga at verði ferðaleiðari á túrinum, og tað játtaði hann, sigur Annika Larsen Black.

Túrurin gongur í morgin til Bakkafjørðin, har vitjað verður á flakavirkinum. Fleiri hundraðtals føroyingar eiga síni spor har, og Óli Jacobsen greiðir frá søguni um føroyingarnar á Bakkafjørðinum.



*Annika Larsen Black, søluleiðari hjá Smyril Line á heimamarknaðinum og Martin Dam Joensen av søludeildini, lurta eftir, meðan Óli Jacobsen kunnar um túrin*
*Mynd: Leo Poulsen*

Mikudagin verður so vitjað í smiðjuni, telegrafstøðini og í kirkjuni og kirkjugarðinum í Seyðisfirði. Har liggja fimm føroyingar grivnir, sum fórust við Riddaranum í 1927.

Siglt verður aftur av Seyðisfirði mikukvøldið, og komið verður á Havnina klokkan 15 hósdagin.

# Føroyingar á Bakkafirði

**- Tað er heilt víst, at Óli Jacobsen hevur økt áhugan fyri hesi ferðini, sigur Martin Dam Joensen frá søludeildini hjá Smyril Line**

ÍSLANDSFERÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin*

Og tað stendur ein áhugaverd ferð fyri framman fyri tey smáu hundrað fólkini, sum hava valt at gera hesa íslandsferðina.

- Á veg norður til Bakkafjørðin ætli eg mær at greiða frá um lívið hjá teimum hundraðtals, ja, kanska túsundtals føroyingunum, sum vóru á Bakkafirði summar eftir summar, sigur Óli Jacobsen.

Nú ber sjávlandi ikki til hjá honum heldur at vera á tveimum støðum í senn, men á vegnum norður til Bakkafjørðin verður hann fyrst í øðrum bussinum og sigur søgu sína, og so verður steðgað á, og tá skiftir Óli buss og sigur somu søgu umaftur.

- Tað verður gjørt á sama hátt á veg suður aftur til Seyðisfirðar. Tá fari eg at greiða frá søguni, tá átta mans av Riddaranum skuldu inn at avrokna við bóndan, áðrenn leiðin gekk aftur til Føroya. Men báturin fekk ein gjálv og hálvdist, og úrslitið var, at sjey av teimum átta monnunum druknaðu. Fimm vórðu funnir aftur, og so gekk tunga leiðin inn til Seyðisfirðar at jarða menninar, greiðir Óli Jacobsen frá.

Tað verður tískil ein lítil minningarhátíð í kirkjuni í Seyðisfirði og í kirkjugarðinum mikudagin, har høvið verður at minnast nakrar av teimum, sum mistu lívið undir Íslandi í 1927.

- Tað eru bert tríggjar hópgravir í Íslandi av føroyingum, tvær teirra eru í Reykjavík, og hin triðja so her í Seyðisfirði, sigur Óli Jacobsen.

Bæði fólk, sum eru við á ferðini, og Smyril Line væna sær nógv av ferðini og spennandi frágreiðingunum hjá Óla Jacobsen.


*Óli Jacobsen, sum til dagligt starvast á Sosialinum, verður frásøgumaður á túrinum á »Slóðum føroyinga í Íslandi«*
*Mynd: Leo Poulsen*